Vikuskiftis Sosialurin



# Evergreen í Norðurlandahúsinum

**Í gjár klokkan 17 varð bjóðað til tíðindafund í Nurðourlandahúsinum. Har var myndaupptøkan ”Evergreen” lýst. Tað er listarfólkið Eva Koch úr Danmark, sum hevur gjørt upptøkuna**

LISTARFRAMSÝNING

*Orð & myndir:*
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Eva Koch er útbúgvin á ”Det kongelige danske Kunstakademi” og ”Facultad de Bellas Artes” í Spania. Framsýningin ”Evergreen” verður at síggja inntil 13. desember í Norðurlandahúsinum.

Myndaupptøkan “Evergreen” snýr seg um bólkatrýst og um óndskapin, ið býr í menniskjanum. Fólk kunnu beinleiðis útihýsa ein persón.

Myndaupptøkan er leikstjórnað í tí vakra landslagnum í Føroyum. Upptøkurnar eru gjørdar í Syðradali.

Hetta er ein sjálvævissøga, og er tað orsøkin til, at tað varð leikstjórnað í Føroyum. Tó eru happing og bólkatrýst evni, ið øll kenna.

Myndaupptøkan er ein yvirlitsupptøka; frá havinum yvir ímóti sjóvarstrondini, yvir landið, framvið nøkrum húsum, eina lítla bygd, nøkur rópandi børn, ið kasta steinar, flytir seg víðari yvir landið, fangar eitt einsamalt barn, ið sleppur sær til rýmingar, heldur áfram ímóti hinari sjóvarstrondini, ímóti havinum og vendir síðani aftur yvir landið.

Ljóðið er veruligt, fuglasangur, havsins sjóð í tí stóra rúminum, eirindaleysu rópini frá børnunum og tey skjótu fetini frá barninum, ið sleppir sær til rýmingar.

Ein einfald, veruleikakend og neyv ringrás, ið slær ring um frummyndarligar endurminningar, sum fara fram millum menniskju gjøgnum alt lívið, bara á ymiskan hátt.



*Eva Koch bjóðaði fólkið vælkomin og greiddi eitt sindur frá myndaupptøkuni Evergreen*



*Mynd úr filminum Evergreen. Hann er um happing*



*Eva fekk vitjan av nøkrum næmingum úr Vestmanna skúla í gjár*

# Hotellskipið á Skála fann Titanic

**Skipið ”Explorer”, sum skal hýsa póllendingunum, sum skulu arbeiða á Skipasmiðjuni á Skála, fann í sínari tíð sokna marglætisskipið Titanic. Explorer var eitt rannsóknarskip, men hevur nú mist siglingarloyvið**

SKIPASMIÐJAN

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Póllendingarnir, sum koma til Skála at arbeiða á Skipasmiðjuni, skulu búgva á einum hotellskipi. Talan er um ”Explorer”, sum er leigað frá einum donskum felag. Skipið hevur ikki siglingarloyvi longur, og varð tað tí sleipað til Føroyar.

Fólk á Skipasmiðjuni greiða frá, at hetta skipið var eitt av teimum, sum funnu Titanic. Sosialurin hevur roynt at fingið hesar søgur váttaðar. Stjórin á Skipasmiðjuni, Gunnar Mohr, sigur fyri vist, at Explorer fann Titanic.

- Jú, eg havi eisini hoyrt hasa søguna. Tað skuldi verið hald í henni. Agenturin fyri felagið, sum vit leigaðu skipið frá, fortaldi okkum, at hetta var skipið, sum fann Explorer, sigur Gunnar Mohr.

Tað vóru trý skip, sum á einari rannsóknarferð, funnu sokna marglætisskipið Titanic. Explorer var eitt rannsóknarskip, tá ið tað sigldi. Nú er skipið ikki í so góðum standi og hevur tí mist sigliloyvið. Menninir á Skipasmiðjuni arbeiða umborð, so at umstøðurnar verða betraðar til tess at póllendingarnir skulu búgva væl.





*Hotellskipið hjá póllendingunum, Explorer, fann sokna marglætisskipið Titanic í sínari tíð*

# Yrkingar á fløgu

**Carl Jóhan Jensen gevur út eina fløgu við yrkingum, sum hann kallar ”September í bjørkum sum kanska eru bláar”**

LIST

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Tað er forlagið Sprotin, sum saman við Tutl gevur fløguna út. Yrkingar verða tó eisini givnar út á prent.

Í hesum sambandi verður bjóðað til móttøku í kvøld klokkan 19 í Meiarínum í Tórsgøtu. Har fer Carl Jóhan at lesa upp í yrkingasavninum. Hetta er fyrstu ferð, at yrkingar verða givnar út á fløgu í Føroyum.

- Eg vildi fegin royna hetta, tí at tað ongantíð er gjørt fyrr, sigur Carl Jóhan og flennir.

- Tað er øðrvísi at hoyra eina yrking lisna upp, enn um tú lesur hana. Tú kanst samanbera tað við at lesa tónleik á einum tónaarki. Tað gerst ikki veruliga livandi, fyrr enn tú hoyrir tónleikin. Tað er á sama hátt við yrkingum. Tónalagið hevur sera stóran týdning fyri, hvussu vit fata orðini, sigur Carl Jóhan.

- Eg havi arbeitt við hesum samstundis, sum eg arbeiddi við bókini ”Ó”. Tað vil siga, at summar yrkingar eru um átta ára gamlar. Tó havi eg hugt alt í gjøgnum aftur og endurnýggjað tær, sigur Carl Jóhan Jensen, sum nú kann hoyrast á fløgu.



*Carl Jóhan Jensen*